SEKS BÓLKAR VERÐA VIÐ Í 4. INNLEIÐANDI UMFARI Í MENTANARHÚSINUM Í FUGLAFIRÐI LEYGARKVØLDIÐ 5. MARS KL. 20.00

# BRAQUET



**Andrias Højgaard**
- sang

**Jóhan á Lakjuni**
- trummur

**Leivur Vitalis**
- bass

**Arni Zachariassen**
- gittar

Tað eru liðin eini trý ár, síðani Braquet byrjaði at spæla. Teir vóru nakrir jammandi vinmenn, sum gjørdust meira seriøsir til Prix Føroyar 2003. Tað gekk rættiliga væl ta ferðina, sjálvt um finalan vegna persónligar trupulleikar kiksaði. Man kann siga, at teir hava ligið eitt sindur í dvala síðani tá. Nakrar fáar konsertir er tað blivið til, men ikki tað heilt stóra. Sum vanligt, er tað skúlagongd uttanlands, sum er komin í vegin.

Nú eru Braquet tó klárir aftur. Teir eru ógvuliga spentir uppá Prix-luttøkuna, serliga nú teir aftur eru endaðir í einum av hørðu umførunum, siga teir. Teir vænta ikki tað stóra, men fara bara at gera tað, sum teir gera – spæla teirra tónleik so væl teir klára, og so hendir tað sum hendir.

Teir eru broyttir eitt sindur síðan seinast. Teir hava funnið seg sjálvar eitt sindur meir. Tónleikurin er blivin tyngri og inniligari, halda teir.

# EGR2PLZ



**Dagfinn Joensen**
- sang og gittar

**Bjarti Hansen**
- gittar og kór

**Heri Reynheim**
- bass

**Rani Christiansen**
- trummur

Bólkurin við teimum løgnu bókstavunum og tølunum skal úttalast sum Eager To Please. Í bólkinum eru royndir tónleikarar, sum hava spælt við í fleiri øðrum bólkum – til dømis Diatribes, MC Hár og Fluffy Toys.

Bólkurin var settur saman fyrst í hesum árinum við tí fyri eyga at vera við í Prixnum í ár, og tí hava teir ongar almennar framførslur á baki undir hesum navninum.

Tað eru tó nakrir royndir tónleikarar, sum eru vanir at spæla rocktónleik, og teir ætla sær eisini at gera tað, sum teir eru bestir til, nevniliga at spæla rock.

Bólkurin sigur eitt sindur lokkandi, at teir fara at hava ein gestatónleikara við á pallin leygarkvøldið, men teir vilja ikki seta navn á hendan tónleikaran.

# KRISTLEIF ZACHARIASEN



**Kristleif Zachariasen**
- sang og kassagittar

**Rógvi á Rógvu**
- slagverk

**Arnold Ludvig**
- bass

**Heðin Ziska Davidsen**
- el-gittar

**Óli Olsen**
- tangentar

Kristleif Zachariasen kom fram sum solistur – singer/songwriter, tey kalla – í kappingini, sum Hafnia Lounge skipaði fyri. Hann vann hesa tónleikakappingina, og síðani hevur hann bæði spælt nógv til tiltøk og givið fløgu út.

Hesaferð fer hann at spæla saman við einum bólki, sum hann hevur spælt við í eina tíð. Talan er um tónleikarar, sum eru kendir frá nógvum øðrum samanhangum og hava drúgvar royndir.

Samstarvið teirra millum byrjaði við útgávuni hjá Kristleif, Litleysir Blettir, og tað heldur síðani hildið fram. Nú fara teir eisini at royna seg í Prixnum.

Tað er Kristleif Zachariasen, sum skrivar sangirnar hjá bólkinum, og tónleikurin verður væntandi ein blanding av poppi, fólkatónleiki og country.

# ONKIKANNDISKUTERAST.ALTKANN



**Andreas Pauli Poulsen**
- bass og sang

**Eyðun Djurholm**
- trummur

**Dagbjartur Meyer (Dabbi)**
- sang og slagverk

**Sigfred Johannes Johannessen**
- gittar og sang

**John Holgarsson**
- gittar og sang

**Karl Anton Klein**
- gittar og sang

**Frans Galán**
- gittar, sang og rennarí.

Bólkurin hevur verið til í eini 3 ár,on og off. Seinasta árið tó mest on.

Onkikanndiskuterast.altkann hevur spælt fleiri væleydnaðar konsertir í 2004, m.a. Rox 2004. Bólkurin luttók í Prixnum 2003. Tann einasti bólkurin, sum ongan veg kom, men sum øll minnast. Sum einasta alternativið á Føroyska Rokkpallinum er onkikanndiskuterast.-altkann eitt positivt og sálfullt innslag. Ein bólkur í støðugari menning, ið spælir inspireraðan rock.

# SYNARCHY

**Leon Hansson**
- sang

**John Egholm Láadal**
- gittar

**John Ivar Venned**
- gittar

**Ísak Petersen**
- bass

**Bjartur Clemensen**
- keyboard

**Martin Rói Vilhelmsen**
- trummur

Bólkurin við navninum Synarchy hevur verið til í tvey ár, men teir hava ikki verið serliga sjónligir á tónleikapallinum. Bólkurin hevur spælt við hesari manningini síðani seint í fjør, og teir hava bert havt eina almenna framførsla – tað var á Margarinfabrikkini í desember mánaði í fjør.

Talan er tí um ein rættiliga feskan og ókendan bólk, sum leygarkvøldið fær møguleikan at spæla fyri nøkrum hundrað fólkum í Mentanarhúsinum og eini størri rúgvu gjøgnum útvarp og net.

Synarchy spælir metal.

# TERJI RASMUSSEN BAND



**Terji Rasmussen**
- sang og akustiskan gittar

**Hjalti Joensen**
- el-gittar

**Rógvi á Rógvu**
- trummur

**Arnold Ludvig**
- bass

**Magnus Johannesen**
- keyboard og kór

Terji Rasmussen var við í bólkinum, sum vann fyrstu Prix Føroyar kappingina í 1995. Tá var rockbólkurin Moirae tað stóra nummarið, men hann er síðani farin í søguna.

Nú er Terji Rasmussen viðaftur í Prixnum sum sangari í sínum egna bólki. Hann hevur havt onkra einstaka gestaupptraðkan sum kórsangari, men nú verður tað við allari orku og egnu sangum, at hann leggur í vaðið aftur.

Terji Rasmussen hevur fingið nakrar av teimum tónleikarunum, sum hann hevur spælt sera nógv saman við gjøgnum árini, at spæla saman við sær hesaferð. Tríggir av tónleikarunum vóru við í tiltikna bólkinum Føstufressar.

Terji Rasmussen hevur seinnu árini spælt javnan til konsertir og dansir kring landið, og tað hevur hann gjørt við sínum egna bólki. Terji kann framføra eina langa røð av kendum sangum, sum hann hevur skrivað gjøgnum árini, men leygarkvøldið verða tað nýggir sangir at hoyra frá honum.